# Friður aftur í Kollafirði

Áki Bertholdsen

Nú er arbeiðsfriður aftur í Kollafirði.

Tað gjørdust veruleiki klokkan 8.15 í gjáramorgunin. Tá skrivaðu Føroya Arbeiðarafelag og Kollafjarðar Kommuna undir nýggjan sáttmála fyri dagrøktarmammurnar í Kollafirði og samstundis fóru tær aftur til arbeiðis, eftir at hava verið í verkfalli í gott tríggjar vikur.

Samstundis vóru eisini samhugaverkføllini hjá Føroya Arbeiðarafelag ímóti Kollafjarðar Kommunu avblást. Sostatt fara øll arbeiðsfólk, sum arbeiða hjá Kollafjarðar kommunu, aftur til arbeiðis.

Millum annað ber tað í sær, at nú verður skúlin aftur vaskaður, so nú kann undirvísingin takast upp aftur, eftir at steðgur hevur verið í eina góða viku.



*Eitt stríð um eina fimm krónu um dagin longdi verkfallið í Kollafirði í eina viku. Men Føroya Arbeiðarafelag vil av prinsipiellum orsøkum ikki siga vunnin rættindi frá sær og kommunan vildi ikki boygja seg fyrrenn hóskvøldið*

### Løn ístaðin fyri eftirløn

Verkfallið í Kollafirði hevur nú vart í gott tríggjar vikur og samhugaverkfallið hevur vart í góðar 14 dagar.

Annars var ein sáttmáli komin undir land seinasta vikuskiftið, men heilt óvæntað førdi ein ósemja um eitt smáttarí við sær, at samráðingarnar slitnaðu.

Partarnir vóru annars samdir um lønina. Tað, sum skilti partarnar var spurningurin um eftirløn fyri at hava gestabørn í dagrøkt.

Gestabørn eru børn, sum ein dagrøktarmamma tekur í dagrøkt í avmarkaða tíð fyri eina dagrøktarmammu, sum plagdi hava barnið, men sum hevur forfall.

Í slíkum førum vildi Kollafjarðar Kommuna ikki lata eftirlønina fylgja við barninum.

Dagrøktarmamman, sum plagdi hava barnið, skuldi missa eftirlønina, men mamman, sum hevði barnið í gestarøkt, skuldi ikki fáa hana afturfyri.

Hetta vildi Føroya Arbeiðarafelag undir ongum umstøðum góðtaka.

Ikki tí, í pengum hevði hetta lítið upp á seg, tí talan er um eina fimm krónu um dagin.

Men fyri Føroya Arbeiðarafelag var talan um eitt prinsipp um, at vunnin rættindi verða ikki latin av hondum aftur. Tað varð heldur ikki góðtikið, at tær skuldu fáa minni í løn fyri at hava gestabørn í dagrøkt

Tískil helt verkfallið á eina heila viku afturat.

Men hóskvøldið fekk Føroya Arbeiðarafelag eitt nýtt uppskot til semju frá Kollafjarðar Kommunu.

Tað uppskotið brúkti Føroya Arbeiðarafelag so náttina til at kanna, og tað endaði við, at felagið tók av.

Úrslitið av tí var, at sáttmáli varð undirskrivaður kl. 8.15 í gjáramorgunin og samstundis var verkfallið avblást, eins og blokadan annars ímóti Kollafjarðar Kommunu.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at semjan ber í sær, at dagrøktarmammurnar framvegis ikki fáa eftirløn fyri at hava gestabørn í dagrøkt.

Men tað, tær skuldu fáa í eftirløn, verður ístaðin lagt oman á lønina.

Sostatt fáa dagrøktarmammurnar umleið 5,5% eyka í løn fyri at hava gestabørn í dagrøkt.

Annars er sáttmálin galdandi við afturvirkandi kraft frá 1. august til 31.desember, tá ið Kollafjørður fer undir Havnina og tá skal nýggjur sáttmáli gerast.

Í nýggja sáttmálanum verður lønarlagið hjá dagrøktarmammum í Kollafirði á sama støði sum í Havn, men tað verður ikki so stórur munur á lønini á at hava størri børn og at hava smæri børn.

Í Havn fáa dagrøktarmammurnar 700 krónur meiri fyri at hava smabørn í dagrøkt enn tær fáa fyri at hava tey størru børnini.

Í Kollafirði verður munurin 350 krónur.

Tær fáa nú góðar 3.000 kr. um mánaðin fyri tey minnu børnini og knapt 3.000 fyri tey størru.

# Kannað fleiri skip

Áki Bertholdsen

Danska verjan hevur seinasta mánaðin kannað fleiri útlendsk skip undir Føroyum.

Færøernes Kommando sigur í einum tíðindaskrivi, at hesa tíðina hava tað veroð ímillum seks og 30 útlendsk skip undir Føroyum um dagin

Mikudagin vóru eitt nú sjey íslendsk, trý fronsk, eitt danskt, eitt enskt og eitt russiskt skip undir Føroyum

Og hendan seinasta mánaðin hevur danska verjuskipið Triton kannað eitt franskt skip, trý russisk og tvey ensk skip.

Hinvegin hevur vaktarskipið Agpa kannað eitt franskt skip, umframt trý íslendsk skip.

Somuleiðis er føroyskt sjóøki kannað við flúgvara, men heldur ikki hesar kanningarferðir hava avdúkað ólógligan fiski-

# Flutti tvey fólk á sjúkrahús

Áki Bertholdsen

Hendan seinasta mánaðin hevur danska sjóverjan flutt tvey fólk av skipum til lands á sjúkrahús.

Bæði fólkini vóru við russiska trolaranum Seymon Lapshenkov.

Talan var um eina 57 ára gamla konu, sum hevði innvortis bløðingar og um ein 63 ára gamlan mann, sum hevði trupulleikar við hjartanum.

Verjuskipið Hvidbjørnen sigldi ímóti trolaranum, sum var staddur 250 fjórðingar í ein landnyrðing úr Føroyum.

Tá ið Hvidbjørnen var nógv nær, fór tyrlan eftir fólkunum og fekk tey umborð á Hvidbjørnen. Har viðgjørdi læknin tey, ímeðan siglt varð ímóti Føroyum. Tá ið Hvidbjørnen var komin nóg nær, fór tyrlan aftur á flog og fleyg fólkini til Havnar, har tey komu á Landssjúkrahúsið.

# Granat við ongum krúti

Beint fyri ólavsøku var Færøernes komando vesturi í Vágum. Løgreglan í Vágum hevði boðað frá, at ein lutur, ið minti um eina granat, varð funnin tveir kilometrar sunnanfyri Miðvág. Serfrøðingar frá Færøernes Kommando fóru vestur og teir funnu so útav, at talan var um eina enska tvey tumma granat, men at onki krút var í henni.

–Áki–

# Nú skal Øravík á Føroyakortið

*Sunnudagin verður eitt slag av fólkafundi á gamla tingstaðnum Uppi Millum Stovur í Øravík*

Áki Bertholdsen

Nú skal Øravík aftur á Føroyakortið.

Øravík er ein gamal, søguligt pláss, men tað eru ikki so nógv, sum geva tí gætur.

Men tað ætlar Suðuroyar Kunningarstova nú at gera nakað við.

–Øravík er í veruleikanum eitt sera forvitnisligt pláss, sigur Jonny Dimon á Suðuroyar Kunningarstovu.

Tí heldur hon, at tað er spell, at tað eru so fá, sum geva tí gætur.

Í Øravík er m.a. tann gamli tingstaðurin í Suðuroy. Har varð ting hildið í øldir, har alskyns mál, bæði stór og smá, komu til viðgerðar.

Tingstovan er í einum gili einans 10 minuttir til gongu frá vegnum.

Í gilinum er ein stórur, flatur steinur, sum varð brúktur til tingborð.

Kendast av teimum málum, sum vóru fyri á tingið í Øravík, er óivað málið, sum vit kenna aftur úr søgnini um Snæbjørn.

Beint við tingstaðin er Rossatindur, har tey, sum møttu á tingið tjóðraðu hestarnar.

Í Øravík eru eisini tvey pláss, fólk vórðu avrættað fyri ymisk brotsverk.

Har eru Skarpheyggjar, har fólk vórðu hálshøgd og niðri í mølini er Gálgagjógv, har fólk vórðu hongd.

Jonny Dimon sigur, at eldri fólk søgdu altíð, at á einum ávísum stað í Gálgagógv var grasið serliga grønt.

Har skuldi tey liggja jarðað, sum vórðu avrættað.



*Suðuroyar Kunningarstova ætlar nú at gera vart við fleiri søgulig støð í Suðuroy. Fyrsta stigi verður ein fólkafundur seinnapartin sunnudagin á gamla tingstaðnum í Øravík*

### Fólkafundur í morgin

Jonny Dimon heldur, at tað er spell, at fólk ikki kenna meiri til hesi plássini.

Fyri at bøta um tað. verður í fyrstu atløgu fólkafundur á gamla tingstaðnum sunnudagin klokkan 14.

Har fer Steinbjørn B. Jacobsen, lærari og rithøvundur, at halda røðu.

Fólk verða biðin um at hava Songfólk Føroya Fólks við og tað sakar helst onki, um tey eisini hava heitt drekka við sær.

Jonny Dimon veit, at hetta er ikki besta árstíðin at hava eitt slíkt tiltak.

Tað hevur eisini verið leingi í umbúna, men altíð er okkurt komið í vegin. Og nú má tað so vera.

Ætlanin er at møtast úti á Gálganum kl. 14 og so verður farið til Øravíkar, haðani farið verður til gongu niðan í tingstovuna.

Annars verða skelti sett upp við vegin, sum vísa fólki á, hvar tingstovan Uppi Millum Stovur er.

Ætlanin er eisini at seta skelti upp, sum vísa á onnur søgulig støð í Suðuroy, eitt nú Gálgagjógv í Øravík, Sigmundsgjógv í Sandvík og Havgríms Grøv í Hovi.



# Gera upptøkur til nýtt sjónband

*Trølla-Pætur og Trølla-omman eru høvuðsleikarar í nýggjum sjónbandi hjá Kulum Rótum*



*Trølla-Pætur, Trølla-omman og onnur góð fólk gera í hesum døgum upptøkur til nýtt sjónband á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Mynd: Jonhard Hammer*

Hósdagin var farið í holt við upptøkurnar til nýtt sjónband við Kulum Rótum, og í tí sambandi hava Trølla-Pætur, Trølla-omman og onnur góð fólk verið at finna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, har fyrstu upptøkurnar verða gjørdar.

Tað er Zacharias Hammer, sum ger upptøkurnar til nýggja sjónbandið, sum eftir ætlan skal koma út miðskeiðis í november mánaði.

Í fjør góvu Kular Røtur eitt sjónband út undan jólum, og tað var so mikið væl eydnað, at tey royna seg við einum nýggjum bandi hesi jólini. Umframt sjónbandið hava Kular Røtur eisini útgivið tvær væl umtóktar fløgur.

Kular Røtur hava havt nógvar konsertir seinasta árið, og 7. oktober verður eitt stórt tiltak í ítróttarhøllini á Hálsi, har Trølla-Pætur, Trølla-omman, Kári Cool, tónleikarar, sangarar og dansarar verða við.

**ek**

# Býráðslimirnir stilla uppaftur

*Listin hjá Tjóðveldisflokkinum til býráðsvalið í Klaksvík er liðugur*

**Klaksvík:** Nú er greitt, hvørji fólkini eru, sum fara at manna listan hjá Tjóðveldisflokkinum til býráðsvalið í Klaksvík í november.

Tey trý fólkini, sum hava sitið fyri flokkin í býráðnum seinatu fýra árini stilla øll uppaftur. Karsten Hansen og Steinbjørn Jacobsen vóru valdir í býráðið seinast, og síðani Karsten gjørdist landsstýrismaður, hevur Herger Joensen røkt annan sessin hjá Tjóðveldinum.

Rani Nolsøe er nýtt valevni hjá Tjóðveldisflokkinum, meðan hini hava stillað upp áður.

Listin sær soleiðis út: Hanus T. Bærentsen, Karsten Hansen, Steinbjørn Jacobsen, Torkil Heinesen, Jórun Høgnesen, Anna Løwe Jacobsen, Hergerð Joensen, Jákup Pauli Johannesen, Rani Nolsøe og Jón Harald Poulsen.

**ek**




# Sig tað uttan rokning



**FøroyaTeletíð konto Sølustøð:**

Telebúðirnar hjá Føroya Tele

Tænastumiðstøðin, Tinghúsvegur, Tórshavn
Teldutænastan, Á Hálsi, Tórshavn
Leif Mohr, Tórshavn
Radiohandilin, Tórshavn
Storno, Tórshavn
JS-Radio, Handilskjarnan, Tórshavn
Elding, SMS, Tórshavn
Delta Elektroniktænastan, Tórshavn
Damor, Argir
Sølufelagið, Hoyvík

Contriv, Klaksvík
Elding, Klaksvík

Spf. Joensen, Vágur
ED Joensens Radiohandil, Vágur
Elektronikbúðin v/Paula Poulsen, Vágur

Radiobúðin, Runavík
Elding, Runavík

**Kort til FøroyaTeletíð konto Sølustøð:**

Posthúsini kring landið
Telebúðirnar hjá Føroya Tele

Bókasølan í SMS, Tórshavn
Føroya Keypsamtøka, Dr. Jakobsensgøta, Tórshavn
Hotel Hafnia, Tórshavn
Kiosk Steinatún, Tórshavn
Kiosk Hornið, SMS, Tórshavn
Kunningarstovan, Tórshavn
Hotel Føroyar, Tórshavn
Kiosk Activ, Tórshavn
Mylnan Bakarí, Tórshavn
Norðurlandahúsið, Tórshavn
Sjómansheimið, Tórshavn
Statoilstøðin í Gundadali, Tórshavn
Sølubúðin á Landssjúkrahúsinum, Tórshavn
Shellstøðin, Norðari Ringvegur, Tórshavn
Shellstøðin, Á Frælsinum, Tórshavn
Statoilstøðin, Argir
Føroya Keypsamtøka, Hoyvík
Shellstøðin, Vestmanna
Statoilstøðin, Kollafjørður

Føroya Keypsamtøka, Klaksvík
Sjúkrahúsið, Klaksvík
Norðoyar Kunningarstova, Klaksvík
Shell Service, Stangavegur, Klaksvík
Statoil Servicemiðstøð, N. Pálsgøta, Klaksvík
Hotel Norð, Viðareiði

Føroya Keypsamtøka, Tvøroyri
Hotel Tvøroyri, Tvøroyri
Fa. Ellen Dahl, v/Solveig Johansen, Vágur
Hotel Bakkin, Vágur

Hotel Vágar, Sørvágur
Kunningardiskurin, Flogvøllurin
Føroya Keypsamtøka, Miðvágur

Runavíkar Sjómansheim, Runavík
Shellstøðin, Norðagøta
Shellstøðin, Oyri
Statoilstøðin, Saltangará
Statoilstøðin, Leirvík
Føroya Keypsamtøka, Saltangará
Føroya Keypsamtøka, Fuglafjørður



FØROYATELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo